## VEÐRIÐ




**Veðrið í Klaksvík (100 ár) hósdagin**
Fyrrapartin skýggjað, útnyrðingur 5 m/s. Seinnapartin kemur sólin fram og hann minkar vindin. Hitin um 12 stig




**Veðrið í Klaksvík (100 ára hald og Sjómannadagur) fríggjadagin**
Sól, útsynningur og sunnan uml. 4 m/s. Hitin allan dagin millum 11 og 13 stig.




**Veðrið í Klaksvík (100 ára hald og Sjómannadagur) leygardagin**
Fyrrapartin turt og landsynningur, 7 m/s. Hitin 11 stig. Seinnapartin dregur hann á luftin, hann veksur vindin nakað og út á kvøldið møguliga okkurt ælið. Hitin 12 stig

**Veðrið í Klaksvík (100 ára hald og Sjómannadagur) sunnudagin**
Landsynningur, 10 til 12 m/s, regn við ælaveðri seinnapartin. Hitin allan dagin millum 11 og 12 stig.

# Klaksvík fær standmynd frá amerikanara

*Amerikanarin Joel Cole hevur gjørt eina rættiliga sermerkta standmynd í samband við 100 ára føðingardagin hjá Klaksvík*



Í sambandi við at Klaksvíkar kommuna hevur 100 ár á baki í ár, hevur amerikanarin Joel Cole latið kommununi eina standmynd, sum fer at standa í Skúlanum við Ósánna, tá skúlin er liðugt umvældur.

Til hetta arbeiðiðið er liðugt, fer standmyndin at standa á Klaksvíkar Bókasavni. Standmyndin er fimm metrar høg og er gjørd úr viði, metalli og gróti. Inn í henni er eitt op, og fyri at leggja eitt sindur afturat standmyndini um Klaksvík og Føroyar, er heitt á 10-15 fólk um at gera ein »tíðarlut« at leggja í eina kliva inni í standmyndina. Tíðarlutirnir verða inni í standmyndini næstu 100 árini og verða latnar upp á 200 ára føðingardegi kommununnar.

Tíðarlutirnir kunnu vera hvat sum helst: Eitt bræv, ein mynd, eitt tónleikastykki, ein søga, ið er tikin upp, eitt klædnastykki ella ein minnislutur, sum er ein viðmerking til lívið í Klaksvík í dag. Tú fært eina metalkassa, har tíðarluturin, tú hevur valt, verður lagdur í. Boksirnar verða síðan settar inn í standmyndina á einum seinni hátíðarhaldi á bókasavninum.

Joel Cole greiðir soleiðis frá hugskotinum til standmyndina:

- This totem addresses the idea of four: the four directions, the four elements, the four seasons, four regions of the Faroe Islands, and the four villages that inevitably became Klaksvik 100 years ago.

Joel Cole var skiftislesandi í Klaksvík fyri 22 árum síðan. Hann fall væl til og virkaði tá millum annað sum tónleikari í Dynamit. Hann var við til Summar Festivalin fyri eini viku síðan saman við bólkinum, har spældi tangentar og sang framúrskarandi, skrivar Klaksvíkar kommuna í tíðindaskrivi.

Sum tøkk fyri frálíkar dagar í Klaksvík, ið Joel kallar sítt næsta heim, gevur hann Klaksvík enn eina sera áhugaverda og øðrvísi standmynd, ið eisini fær hugin at reika, verður sagt.

-km

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 16 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst 985 hPa liggur við norðara part av Norðsjónum, men fer í nátt í ein landnyrðing og grynnist. Ein veikur



hátrýstryggur 1005 hPa við Ísland ferðast spakuliga í ein landsynning ímóti Føroyum.

*(Kelda: dmi.dk/yr.no)*

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00]. Hitin í gjár: 10.9°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/08 kl. 06[00] – 12/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 2 mm




Lesið
Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 8. august | Fyrra kvarter |
| 10. august | Mánin longst frá jørðini |
| 16. august | Fullmáni |

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. aug. | 4:54 | 17:16 | 3:54 | 16:16 | 4:09 | 16:31 | 6:54 | 19:16 | 7:54 | 20:16 | 3:09 | 15:31 | 2:09 | 14:31 | 5:09 | 17:31 | 6:09 | 18:31 | 4:39 | 17:01 | 5:54 | 18:16 |
| 14. aug. | 5:39 | 18:01 | 4:39 | 17:01 | 4:54 | 17:16 | 7:39 | 20:01 | 8:39 | 21:01 | 3:54 | 16:16 | 2:54 | 15:16 | 5:54 | 18:16 | 6:54 | 19:16 | 5:24 | 17:46 | 6:39 | 19:01 |
| 15. aug. | 6:19 | 18:40 | 5:19 | 17:40 | 5:34 | 17:55 | 8:19 | 20:40 | 9:19 | 21:40 | 4:34 | 16:55 | 3:34 | 15:55 | 6:34 | 18:55 | 7:34 | 19:55 | 6:04 | 18:25 | 7:19 | 19:40 |
| 16. aug. | 7:02 | 19:23 | 6:02 | 18:23 | 6:17 | 18:38 | 9:02 | 21:23 | 10:02 | 22:23 | 5:17 | 17:38 | 4:17 | 16:38 | 7:17 | 19:38 | 8:17 | 20:38 | 6:47 | 19:08 | 8:02 | 20:23 |
| 17. aug. | 7:45 | 20:05 | 6:45 | 19:05 | 7:00 | 19:20 | 9:45 | 22:05 | 10:45 | 23:05 | 6:00 | 18:20 | 5:00 | 17:20 | 8:00 | 20:20 | 9:00 | 21:20 | 7:30 | 19:50 | 8:45 | 21:05 |